## Eftirlitsmaður

Søkt verður eftir eftirlitsmanni til setan 1. mars 2003.

**Uppgávan:**
Uppgávan snýr seg um regluligt eftirlit við akførum og umsýn av akførum, sum ikki verða góðkend við fyrsta sýn. Starvsøkið fevnir um øll eftirlitsstøð stovnsins, sum verað røkt út frá høvuðsdeildini í Tórshavn. Frammanundan eru 5 fólk í starvi á deildini

**Førleikakrøv:**
Vit hugsa okkum ein persón við bilmekanikaraút-búgving og hollum royndum innan økið. Dentur verður lagdur á góð samstarsvevnir og at viðkomandi er fyrikomandi, men kortini kann fremja eftirlitsarbeiðið á ein myndugan hátt.
Tað er ein fyrimunur, um viðkomandi hevur teldukunnleika og koyrikort til lastbil/buss og stóran viðfestivogn.

**Setanartreytir**:
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið og tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til tlf. 350400 og tosa við Búgva Apol, deildarleiðara. Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 3. februar 2003.

**Bileftirlit Føroya**
Hoyvíksvegur 57
Postsmoga 3206
110 Tórshavn

*Bileftirlit Føroya er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stilla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skrásetingu av koyrikortum og umsita akfaraskrásetingu og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn hevur Bileftirlitið sýnsdeildir um alt landið. Á Bileftirlitinum starvast 18 fólk.*

## Frá Føroya Psoriasisfelag

Vit vilja hervið boða frá at komandi viðgerðartúrur til Bláa Lónið verður 13. apríl til 9. mai 2003. Tey, ið hava tørv á viðgerð verða biðin um at fara til egnan kommunulækna. Læknin fyllir umsóknarblað út og sendir tað til húðlæknan.

Umsóknin skal latast inn í seinasta lagi 1. februar 2003.

Um ivaspurningar eru hesum viðvíkjandi eru tit vælkomin at ringja á tlf. 424 179.

SJÓVAR KOMMUNA

Hervið verður matstovan í bygdahúsinum á Strondum lýst til leigu frá 1. mars 2003.

Umsóknir skulu verða í Sjóvar kommunu í hendi í seinasta lagi 15. feb. 2003.

**Sjóvar kommuna**
490 Strendur

## Stór sethús til sølu



Húsini í Onnugøtu 3, Tórshavn, eru til sølu. Gólvvíddin er 179 m2 (íalt í einari hædd), umframt eitt lægri loft, sum er 59m2.

Í húsunum er stórur køkur við komfýri, bakarovni og kuldaskápi, grovkøkur við komfýri, uppvaskimaskinu og vaski. Loftið í køkinum og stovuni ganga upp í tróðri. Tvey kømur eru umframt hjúnarrúm, stórt baðiverilsi við saunarúmi og eitt wc við brúsu og vaski. Fýrrúm við arbeiðsborði og hjallur við frystiboks.

Hiti er í køksgólvinum, gólvinum í grovkøkinum og í baðiverislinum.

Grundøkið er slætt við góðum parkeringsviðurskiftum, og húsini eru lætt atkomilig.

Húsini kunnu síggjast eftir nærri avtalu. Ringið

**Tlf. 225429 ella 448001**

## Bókhald

Søkt verður eftir einum fólki til at arbeiða í bókhaldinum.

Tann, ið setast skal í starvið, má hava góð samstarvsevnir, men má eisini kunna arbeiða sjálvstøðugt og hava góðan kunnleika til bókhald.

Løn sambært avtalu.

Starvið skal setast skjótast gjørligt, og umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 10.2.2003.

**P/F SMYRIL LINE**
Postboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf. (+398) 345900 · Fax (+298) 345959
E-mail: finance@smyril-line.fo
http://www.smyril-line.com

## Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480

## Sethús í Havn til sølu

**Javnagøtu 10**



Húsini eru í 2 hæddum, hvør 120 fermetrar og standa í barnavinarligum, friðarligum umhvørvi við góðum útsýni.
Báðar hæddir eru innrættaðar, við íbúð í niðaru hædd. Grundøkið er uml. 500 fermetrar.
Uttanum húsini er stoyptur garður við trægirðing.
Byggiár: 1983.
Kostnaður: kr. 1.875.000

Áhugað kunnu ringja
**tlf. 322424 ella 254637**

## Bilur við skaða til sølu!

**Merki:** Honda Civic VTEC 4 hurðar sedan
**Árg.:** 2002
**Km:** 13.134

Bilurin stendur hjá P/F Reyni Service og verður sedur fyri hægsta boð yvir kr. 40.000,- sum hann stendur.



**P/F Reyni Service**
Bilasølan
Tlf. 353040 – lokal 112 og 116

## Hús í Klaksvík til sølu

Ognin Heygavegur 63 er til sølu um hóskandi boð fæst.

Matr. nr.: 1436
Grundøki: 290 m²
Húsini: ca. 7,5 x 7,10 m í trimum hæddum
Høgur kjallari, sum ikki er innrættaður.
Í kjallaranum er góður hjallur.
Urtagarður er kring húsini.

Húsini eru gjørd úr betongi uml. 1957, nýtt tak og isolerað í 1997, norður og suður síðurnar eru klæddar við timbri í 1999.

Áhugað kunnu ringja **457791**, best eftir kl. 10.00.

## Lastbilur til sølu

Scania 143 við last til sølu.

**Tlf. 213 220**



sera bíligt at
# leiga sjónvarp

úr 240,- og niðureftir (einki depositum)

Allar støddir 20-26"

Vit hava eisini video

RADIO VERKSTAÐIÐ
v/Guttorm Mortensen
Mannbrekka 1 - Tórshavn
Tlf. 319544

Valdemar Lützen Byggibúð
Byggimarknaðurin ið ger tað lættari...

### Bókhaldari

Til okkara nýstovnaða byggimarknað mitt í býnum, verður søkt eftir fólki til bókhalds- og skrivstovuarbeiði.

Tann ið setast skal í starvið, má hava hollan kunnleika til bókhald og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Telduskipanin Navision verður brúkt.

Løn sambært avtalu.

Starvið skal setast skjótast gjørligt.
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði, og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. februar 2003

S/pf Valdemar Lützen
P.O. Box 20
FO-110 Tórshavn
Att: Høgni Lützen

Byggibúðin
Tlf. 311020
Fax. 310822
E-mail: v-lutzen@post.olivant.fo

*Fyritøkan Valdemar Lützen hevur 98 ár á baki. Góðska og góð tænasta verður altíð sett í hásætið. Umgangstónin er lættur og ein skal ikki langt fyri at fáa ein hjálpandi hond, um á stendur.*

*Okkara høvuðsgrein er smásøla v.m. Og málsetningur okkara er at økja virksemi okkara, við góðari kundatænastu og kappingarførir prísir.*

## RØRARBEIÐI

Skjót og góð tænasta
innan hita, vatn, sanitet og ventilatión
Ring og avtala tíð
*Tilboð verða eisini givin*




TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Felagsinnskriving skúlaárið 2003/2004
### í Tórshavnar kommunalu skúlar og frítíðarskúlar

Foreldur ella verjar, ið ætla at lata barn/børn fødd fyri 1. januar 1997 í **1. flokk í Argja skúla, Venjingarskúlanum, Tórshavnar Kommunuskúla, Sankta Frans skúla, Eysturskúlanum ella Hoyvíkar skúla** næsta skúlaár, verða biðin at siga frá í býráðssalinum 28. ella 29. januar 2003.

**Innskrivingin**
Innskrivingin í allar skúlarnar er í býráðssalinum **týsdagin 28. og mikudagin 29. januar, báðar dagarnar frá kl. 3-6 seinnapartin. Havið dóps/navnabræv við.**
Mentamáladeildin skipar fyri einari felagsinnskriving. Pláss er ikki fyri øllum teimum næmingunum, sum búgva næst við ávísan skúla í býnum, tí er neyðugt at flyta næmingar í skúla, har pláss er.

**Eisini ber til at ringja**
Møguleiki er eisini at ringja í býráðssalin somu tíð tlf. 254010

**Skúlaumbøn**
Tað ber til at biðja um at fáa barn/børn í ein av skúlunum. Mentamáladeildin fer saman við skúlastjóranum at kanna eftir, um tað er gjørligt, sum plássviðurskiftini í skúlanum eru. Tá ið felagsinnskrivingin er liðug, fær hvør skúli boð um, hvørjir næmingar skulu koma í 1. flokk.

**Hoyvíkar skúli**
Næmingar í Hoyvíkar skúla fara í skúla kl. 11.50, men kunnu fara í Frítíðarskúla fyrrapart.

**Kollafjarðar skúli**
Innskrivingin í Kollafjarðar skúla er í skúlanum **týsdagin 28. januar, frá kl. 3-5 seinnapartin.** Børn, ið skulu í Frítíðarskúlan, kunnu verða innskrivað í skúlanum somu tíð, sum innskrivingin er.

**Kaldbaks skúli**
Innskrivingin í Kaldbaks skúla er í skúlanum ella á tlf. 317845.

**Frítíðarskúlin**
Børn, ið skulu í Frítíðarskúlan, kunnu verða innskrivað í býráðssalinum somu tíð, sum felagsinnskrivingin er. Eisini fáast umsóknarbløð til Frítíðarskúlan í Snarskivuni, heimasíðu kommununnar (www.torshavn.fo) ella á tlf. 315160.

**Meiri fæst at vita**
Meiri fæst at vita um innskrivingina í skúlunum ella í mentamáladeildini, Jákupi Simonsen, deildarleiðara í trivnaðarfyrisitingini, tlf. 315160.

**Tórshavnar kommunalu skúlar og frítíðarskúlar**

## Virkisbygningur á Hjalla

*2000 m²*

1500 m² eru tøkir til útleigu:
500 m² á 1. hædd *kann nýtast til lagur, verkstað o. líkn.*
800 m² á 2. hædd *verður innrættað eftir ynski, til kontórir o. líkn.*

*Bygningurin er klárur 1. mai 2003.*
*Leigast kann út samlað ella í pørtum!*

*Ring og hoyr nærri!*



*Áhugað kunnu venda sær til:* Hans Dam · Kristiansgøta 40 · FO-188 Hoyvík · Tel 31 85 34 · 21 85 34 · hans-dam@post.olivant.fo